4

Heilsu-og innlendismálaráðið
*att: Petur Joensen-Ráðgevi*

Tórshavn 3.febr.2019

<u>Viðv. Uppskot til løgtingslóg um eltrygd.</u>

Havi lisið og gjørt viðmerkingar, men ikki eftir minari meta so víttfendar. Eisini havi eg send kopi til skeiðlærarin hjá okkum í el-yrki ( jj el-konsulenterne) ***Jørn Jørgensen*** og hava vit haft ein dialog um m.a nær ráðiligt er, at hava uppfylgjandi skeið fyri virkandi el-innleggjara og um sveinar skullu verða við ella hvussu hetta skal skipast.

Eisini segði eg honum, at vit í Áhugabólkinum hjá El-Innleggjarar í Tórshavn, fara at hava felagsfund komandi ***hóskvøld 7.febr. kl. 19.00 á Hotel Tórshavn***, har vit m.a. hava fingið Magnus Magnussen frá El-nevndini at gerða eina framløgu og vit í felag fáa gjøgnumgingið tað mesta av tilfarinum.

Eftir fundin er mín hugsan, at vit kundu komið við felags viðmerkingar til eltrygdar løgtingslóg.

***Jørn Jørgensen*** frá el-konsulenterne helt, at vit skuldu bíða við áseta skeiðs dato,fyrrenn vit vita meira um tær 4 kunngerðirnar sum eru áveg , sum eru nevnt í § 5. fyrst tá kann takast støðu til eftirútbúgving.
Eisini helt hann, at el-innleggjarnir skullu á skeið fyri seg, meðan el-sveinar og lærlingar fyri seg, tí har er munur á innihaldinum.
Annars verður eitt meira spennandi mál, tá ið kunngerðin fyri løggilding av el-innleggjarar verður send út til hoyringar og um hon verður persónlig ella virkis, eins um hvør kemur framyvir at standa fyri hesum , sjálv el-nevndin ella SEV, tí sum hon er nú, virkar hon bert avlagandi fyri verandi virkir.

Ein annar spurningur sum vinnan ofta spyr um , er hví vit ikki hava løggilding av VVS-yrkinum í Føroyum, tá ið vit hava lærlingar í vvs-yrkinum á Tekniska skúlanum í Tórshavn.

Møguliga kanst tú svara uppá, nakað meira um komandi 4 kunngerðirnar og nær hesar verða sendar út ?

**Vinarligast**
**Einar Mikkelsen Sp/f**



*Høgni B. Mikkelsen*
*El-Innleggjari*